# Owen til United



Tað sum fyri nøkrum árum síðani tóktist fullkomiliga óhugsandi, kann gerast veruleiki. Manchester United og Michael Owen skriva møguliga undir sáttmála. Heimasíðan bold.dk endurgevur enskar fjølmiðlar fyri at siga, at Manchester United hvørki vil vátta ella avsanna leysasøgurnar. Sambært sjónvarpsrásini BBC skal Michael Owen møguliga kannast av læknum longu í dag, soleiðis at hann skjótast gjørligt kann loysa Carlos Tevez av, sum eftir øllum at døma er á veg úr Manchester United.

# Útisetar trupult við at manna lið

Tað hevur vakt ans niðri, at ÍF Føroyar skal møta AB í donsku steypakappingini. Danska fótbóltsheimasíðan bold.dk hevur tosað við Una L. Hansen, sum hevur ábyrgdina av næst- og triðbesta liðnum hjá ÍF Føroyum. Hann hevur greitt heimasíðuni frá, at tað verður ógvuliga trupult hjá ÍF Føroyum at manna lið til dystin, sum er settur at vera 13. august. Hetta hóast dysturin í móti fyrrverandi felagnum hjá Christian Høgna Jacobsen, er nógv tann største avbjóðingin, ÍF Føroyar nakrantíð hevur staðið yvir fyri. Augustmánaður er feriutíð hjá flestu av leikarunum hjá ÍF Føroyum, sum tískil eru heima í Føroyum um tað mundi, dysturin móti AB skal spælast.



Aksel H. Poulsen og Bjartur Lamhauge vunnu á grønlendsku finalumótstøðuni, tá Føroyar týsdagin vunnu gull í badminton

Mynd: Álvur Haraldsen

# Sláa alla mótstøðu niður

**Finaludagurin í badminton fær føroyska luttøku, so tað forslær. Hósdagin spældu bæði mans- og kvinnudoublan seg í finaluna**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Eftir at hava tikið øll á bóli í liðkappingini, hava føroysku badminton-spælararnir hildið flotta stílinum.

Mikudagin vunnu Aksel H. Poulsen og Sigrun Smith seg í hálvfinalurnar í einmansleiki, og í gjár gjørdu bæði mans- og kvinnudoublan tað sama.

Hjá monnum spældu Aksel Poulsen og Bjartur Lamhauge seg í finaluna, har teir skulu spæla móti sama grønlendska parinum, sum stóð hinumegin netið í liðkappingini. Og hjá kvinnum verða føroysku umboðini Guðri Poulsen og Sigrun Smith.

## Rimmar finaludagur

Og so er lagt upp til rimmar finaludag leygardagin. Tá spæla einstaklingar hálvfinalu og finalu, meðan tað bert er finaludystur á skránni í tvímansleiki.

Umframt gullið í liðkappingini hava føroysku spælararnir soleiðis longu nú tryggjað sær fýra heiðursmerki, og framvegis er møguleiki at fáa eitt mix-par í finaluna. Tað verður avgjørt í dag, og eru vónirnar serliga stórar til Absalon Eysturoy og Sigrun Smith.

## FAKTA

**Menn**

Aksel H. Poulsen/Bjartur Lamhauge, í finaluni

Absalon Eysturoy/Rógvi Poul Poulsen, taptu 1/8-finalu

**Kvinnur**

Sigrun Smith/Guðri Poulsen, í finaluni

Bryndhild D. Carlsson/Rannvá D. Carlsson, taptu 1/4-finalu

## Jógvan og Hilmar Jan í høllini

Endabresturin á Oyggjaleikunum verður leygardagin, og á Rás2 er ætlanin at seta eitt ordiligt punktum fyri leikunum.

Við føroyskum eygum er lagt upp til rimmar brak í Vikingahallen, har badminton verður spælt, og frá klokkan 7 leygarmorgunin setir Rás2 fokus á dystirnar.

Fyri fyrstu ferð á leikunum verða Jógvan Arge og Hilmar Jan Hansen paraðir, soleiðis at teir báðir koma at siga frá finalunum.

- Badminton hevur staðið seg framúr væl á leikunum, har tey longu hava vunnið eitt gullmerki, umframt tey heiðursmerki, sum fara at spyrjast burtur úr finaludegnum. Og tá ein ítróttargrein markerar seg somikið væl, so halda vit avgjørt, at vit mugu svara aftur við at senda okkara bestu frásøgufólk á staðið, sigur Eyðun Klakstein, sum stjórnar fyri útvarpspartinum á redaktiónini í Marienhamn.

*-mørk*